## Danskir bankar mist nógv

Tann seinasti ársfjórðingurin royndist eftir øllum at døma stak illa hjá teimum donsku bankunum. Jyllands-Posturin skrivar, at tað er ikki óhugsandi, at bankarnir mistu so mikið sum fimm milliardir krónur tríggjar teir seinastu mánaðirnar í fjør. Altjóða fíggjarkreppan gjørdi, at bankarnir mistu nógv av óhepnum útlánum og óhepnum íløgum, skrivar blaðið. Mett verður, at donsku bankarnir høvdu millum seks og níggju milliardir í avlopi fyri skatt í fjør ímóti 39 milliardum krónum í 2007.



## Bono í New York Times

Írski rocksangarin Bono, ið eisini er kendur fyri síni politisku sjónarmið, hevur skrivað undir ein sáttmála við blaðið New York Times. Sambært avtaluni skal Bono skriva stuttar viðmerkingar av ymsum slagi til blaðið, og tann fyrsta stóð at lesa í gjár. Andrew Rosenthal, blaðstjóri á New York Times, er sera fegin um at fáa Bono til høvund. Hann sigur Bono vera ein óvanligan persón, sum hevur sína egnu uppfatan av heimsins trupulleikum.

# Matstovuvinnan bundin niður

**Tað snýr seg ikki um at geva matstovuvinnuni møguleikar fyri at spara nakrar krónur í meirvirðisgjaldi upp á kinakál. Tað snýr seg um at geva vinnuni nakrar virðiligar og dagførdar karmar at virka undir. – Politikararnir kunnu passandi byrja við at loyva heilsølum at innflyta vín og aðrar drykkivørur við alkoholi fyri kundar við skeinkiloyvi. Síðani kunnu teir undir skipaðum viðurskiftum loyva lýsingum við drykkivørur, sigur Jóhannes Jensen, stjóri fyri Hotel Føroyar samtakinum**

ARBEIÐSUMSTØÐUR
*Leif Láadal*

– Kundarnir í Føroyum fáa í nógvum førum ein skeiva fatan av, hvat tað er vit fáast við, eins og einkarrætturin í sambandi við keyp av víni, øli og sterkari rúsdrekka køvir allan dynamikk á økinum.

Jóhannes Jensen, stjóri á Hotel Føroyar samtakinum, sum umframt Hotel Føroyar eisini umfatar Hotel Tórshavn, Kerjalon, Hvonn, Café Vágsbotn og Borðkrókin í Norðurlandahúsinum, er ørkymlaður. Nú tosað hevur verið um umstøðurnar hjá matstovuvinnuni, hevur millum annað verið ført fram, at matstovurnar áttu at sloppið bíligari í meirvirðisgjaldi, eins og tær áttu at sloppið bíligari, tá tær keyptu í Rúsdrekkasølu Landsins.

Tað, at matstovur skulu sleppa bíligari í innkeypi, ljóðar sjálvsagt gott í oyrunum hjá Jóhannesi Jensen, men hann ivast stórliga í, um nakrar spardar meirvirðiskrónur upp á kinakál, fara at bjarga støðuni, eins og serprísir í Rúsuni heldur ikki eru vegurin fram.

**FAKTA**

Drykkivørur eru ein týdningarmikil inntøkukelda hjá føroyskum matstovum. Uppteljingar hjá Hotel Føroyum samtakinum vísa, at 40 prosent av inntøkunum á matstovum tess, stava frá drykkivørum.

- Tá tú byrjar í hesi vinnu, veitst tú hvørjar fíggjarligu treytirnar við eitt nú meirvirðisgjaldi eru, men at tú skalt vera bundin av einum einstøkum almennum innflytara av víni, útlendskum øli og spiritusi, líkist ongum, eins og tað er upp á tíðina, at vit sleppa at fortelja almenninginum, hvat tað er vit selja, sigur Jóhannes Jensen,og sipar til lógarforboðið í sambandi við lýsingum við drykkivørum við alkoholi.

### Heilsølurnar skulu selja

Sum er, er tað ein almenn fyritøka – Rúsdrekkasøla

*»At vera bundin av einum einstøkum almennum innflytara av víni, útlendskum øli og spiritusi, líkist ongum, eins og tað er upp á tíðina, at vit í matstovuvinnuni sleppa at fortelja almenninginum, hvat tað er vit fáast við«*

*Jóhannes Jensen, Stjóri á Hotel Føroyar samtakinum*



**FAKTA**

Tað heilt serliga við gistingarhúsum í Føroyum, er at heimamarknaðurin umboðar ein lutfallsliga lítlan part av gistingunum í Føroyum, meðan heimamarknaðurin í flest øllum londum í Evropa umboðar umleið 60% av øllum gistingunum. Útlendsku ferðafólkini í londunum rundan um okkum umboða bert umleið 40 - 45% av samlaðu gistingunum í einstaka landinum. Til samanberingar eru útlendsku gistingarnar í Føroyum umleið 75 - 80%.

# Pengar til ferðavinnuna eru ein

**Tá vit tosa um matstovur, verða ferðafólk ofta nevnd. Og tað er rætt at nevna tey, tí nútímans ferðafólk vilja gjarna uppliva villu og fjarskotnu natúrina í Føroyum, men tey vilja samstundis eisini hava flestu vanligu møguleikarnar. Tað sigur Jóhannes Jensen, hotelstjóri, sum minnir á, at stuðul til ferðavinnuna ikki er olmussa, men ein góð íløga**

TEY VITJANDI
*Leif Láadal*

Týdningarmesta uppgávan hjá almennu Føroyum, tá tað snýr seg um ferðavinnu, er at gera fólk úti í heimi varug við, at tað er eitt stað, sum eitur Føroyar. Altso "branda" Føroyar, sum tað javnan verður sagt í hesum døgum.

Tað heldur Jóhannes Jensen, stjóri á Hotel Føroyum samtakinum, sum hevur torført við at skilja, at tað so ofta verður tosað um stuðul til ferðavinnuna, tá evnir sum branding og marknaðarføring av Føroyum eru uppi og venda.

- Tá tú fært nakað aftur fleirfaldað, áttu politikarar og onnur heldur at tosa um tað, sum tað verulig er, nevniliga ein íløga – og enn tá ein góð íløga, sigur hotelstjórin.

### Alt tað vanliga

Jóhannes Jensen vísir á, at eitt útlendskt ferðafólk, sum vitjar oyggjar okkara, ivaleyst kemur hendan vegin, tí her er øðrvísi enn aðrastaðni, men tá serstaka føroyska natúran er upplivað, vilja tey allarflestu hava eitt góða máltíð, eitt gott glas av víni ella øðrum afturvið, eitt gott internetsamband á gistingarhúsinum, eina góða song og aðrar nútímans upplivingar og hentleikar. Hetta ger, at góðskan á tí, sum gistingarhús- og matstovuvinnan skal kunna bjóða, má vera av besta slag, og tað kostar.

- Vit fara framhaldandi at royna at bjóða útlendskum vitjandi tað besta, sum vit kunnu, men tað er ikki okkara uppgáva at fortelja úti í heimi, at Føroyar eru til. Hesa uppgávu eigur tað almenna – antin gjøgnum síni egnu feløg, ella við at stuðla privatum, sum vilja